# Vit mugu vísa vegin

**Føroyar og ES mugu vísa vegin, tá tað snýr seg um at fáa skipað viðurskifti á svartkjaftaveiðuni. Svartkjafturin ferðast serliga í føroyskum og ES sjóøkið, tí liggur tað á okkum, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður**



SVARTKJAFTURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Norski fiskivinnumálaráðharrin hevur boðað frá, at Noreg er hildið uppat við at veiða svartkjaft. Hann heitir á Føroyar og Ísland um at gera tað sama fyri at tryggja stovnin.

Sambært Jóannesi Eidesgaard hevur landsstýrið ikki viðgjørt spurningin enn. Men hann dugir ikki at síggja, at Føroyar fara at steðga veiðini. Men at landsstýri er sinnað at fáa skipað viðurskifti á svartkjaftaveiðuni. Løgmaður ætlar sær at viðgera spurningin saman við Bjørn Kalsø landsstýrismanni í fiskivinnumálum.

Løgmaður sigur, at hann herfyri umrøddi málið við ES Fiskivinnukomiserin Joe Borg. Hesin var positivt sinnaður fyri, at stig máttu takast og var samdur í, at ábyrgdin liggur á ES og Føroyum.

Jóannes Eidesgaard vísir á, eins og Hjalti í Jákupsstovu, at Svartkjafturin hevur sera stóran týdning fyri føroyska búskapin, og at týdningurin møguliga fer at gerast enn størri við at svartkjaftur gerst dýrari vøra enn í dag.

Hann heldur, at føroyingar skulu velja at taka útmeldingina frá norðmonnum í positivasta anda. Vit hava ein felags trupulleika at loysa. Tí er neyðugt at royna at finna semju. Hvør taktikkur liggur aftan fyri sigur Eidesgaard seg ikki hava innlit í. Men føroyingar eiga at brúka hetta positivt.

Hann vísir á greinina herfyri í Fiskaren, har støðan hjá føroyingum, sum møguligum semingslandi varð viðgjørd. Hann heldur, at við at taka útmeldingina frá norðmonnum positivt, kunnu vit vísa vegin.

Fyrsta stig, noyðist at verða at semjast um TAC, fyri svartkjaft. Síðan kunnu vit tingast um býtið.

Hetta málið er steðgað upp á embætisstigi. Tí er neyðugt at taka málið upp á politiskum stigi. Fyrst á fiskivinnupolitiskum stigi, men møguliga eisini á ovasta stigi.

Hann sigur í hesum sambandi, at lógin um uttanríkispolitiskar heimildir letur upp fyri, at føroyingar kunnu taka initiativ í hesum máli.

Hann sigur seg tó ikki vænta stórvegis avgerðir í Noreg næsta hálva árið. Val verður í heyst, og tí verða neyvan, avgerðir av hesum slag tiknar, áðrenn valið er av.

Hjalti í Jákupsstovu segði á hvítusunnu við Portalin, at málið er vorðið so politiskt, at tað má takast upp á hægsta polititiska stigi. Fiskimálaráðini eru so sterkt ávirkað av vinnuni, at hetta má hægri upp.

Jóannes Eidesgaard sigur, at Hjalti sjálvandi er tann, sum hevur best innlit í hetta. Tí hann hevur arbeitt við tí so leingi. Men at tað er ein sannroynd, at fiskimálaráðini eru tætt knýtt at vinnuni, sum ofta virkar sum ráðgevar. Tað kann tí verða neyðugt avgreiða málið á hægri stigi.

Atli Hansen, formaður í Felagnum Nótaskip, segði fríggjakvøldið við Útvarp Føroya, at tað er taktikkur, tá norðmenn velja at leggja flotan aftan á at kvotan er uppfiskað. Jóannes Eidesgaard sigur seg ikki hava nóg gott innlit í málið til at úttala seg um hetta. Men at tað eingin loyna er, at Noreg hevur verið við til at økja veiðutrýstið.

# Vit koma ongan veg við at vera fitt

**Vit eiga at halda fast í okkara rættindum og ikki bakka fyri at tekkjast norðmonnum, heldur Heidi Petersen, talskvinna Tjóðveldisfloksins í fiskivinnumálum**



SVARTKJAFTURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Heidi Petersen, sum er talskvinna Tjóðveldisfloksins í fiskivinnumálum, er samd við Atla Hansen formanni í Felagnum Nótaskip, sum við Útvarpi segði, at útspælið hjá norska fiskivinnumálaráðharranum er reinur taktikkur. Í løtuni hava norðmenn brúkt sína svartkjaftakvotu og kunnu senda skipini til annan fiskiskap eitt nú sild. So royna teir, at kroysta okkum eisini at steðga svartkjaftafiskiskapinum. Men hetta eiga teir ikki at sleppa, sigur Heidi Petersen avgjørd.

Okkara skip eiga at dríva á og royna at fiska mest møguligt av okkara kvotu. Vit noyðast at vera framfýsin og læra av íslendingum á hesum økinum. Vit hava alt ov ofta verið ov lagalig, og endin er, at vit sita við vánaligum úrslitum. Vit koma ongan veg á altjóða vinnupolitiska pallinum, við at vera fitt, sigur hon.

Hon minnir á, at okkara partur av samlaðu svartkjaftaveiðuni er so lítil, at tað nyttar einki, um vit leggja skipini og hinir dríva á.

Hon heldur tó, at sjálvandi mugu vit taka fiskifrøðilig atlit. Vit eiga eisini at tingast, men alneyðugt er at vit ikki slaka og fara at leggja skip. Vit kunnu tingast meðan skipini fiska mest møguligt.

Hon er als ikki samd við løgmanni, tá hann sigur, at Føroyar og ES mugu vísa vegin. Føroyar og ES hava heilt ymisk áhugamál, og tí dugur hon ikki at síggja, hvussu vit skulu vísa vegin saman.

### Danir kunnu uppsiga okkara sáttmálar

Heidi Petersen sigur seg als ikki skilja, at løgmaður heldur, at lógin um uttanríkispolitiskar heimildir ger, at vit kunnu taka vinnupolitisk initiativ.

Føroyingar hava í nógv ár tikið initiativ, og hava m. a. samráðst við norðmenn, grønlendingar og kanadiarar uttan trupulleikar. Gamaní hevur danskur eygleiðari verið við. Men nú skulu vit í staðin sjálv kunna danir.

– Sum nakað nýtt kunnu danir einvíst uppsiga okkara sáttmálar, um teir ganga ímóti donskum áhugamálum. Hetta kunnu kanska eisini verða ES-áhugamál. Hetta hevur ongantíð verið definerað í lóggávuni áður, sigur Heidi Petersen.

# Norðmenn eru taktiskir

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Atli Hansen formaður í Felagnum Nótaskip, segði við Útvarp Føroya fríggjakvøldið, at tað er taktikkur, tá norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen sigur, at Noreg er givið við at veiða Svartkjaft í norskum og altjóða sjógvi.

Noreg hevur longu fiskað sína kvotu hendan ársfjórðingin og hevur tí ongan rætt at fiska svartkjaft, nú hann stendur í føroyskum sjógvi.

Hann sigur seg hava lítla tiltrúgv til góða viljan hjá norðmonnum. Hann vísir á, at seinastu árini hava norðmenn veitt akkurát líka nógv, sum havfrøðingar hava tilmælt fyri heildarveiðuna eftir svartkjafti, og hann spyr, um meiningin er, at hini londini ongan svartkjaft skulu fiska.

# Føroyingar missa mest

**Føroyingar eru teir, sum fara at missa mest, um svartkjafturin verður niðurfiskaður, sigur Hjalti í Jákupsstovu**

SVARTKJAFTURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Stórir partar av okkara flota og okkara búskapi eru fullkomiliga tengd at svartkjaftaveiðuni. Harumframt kunnu føroyingar fiska svartkjaft alt árið.

Fiskiskapurin er – sum er – ov stórur. Okkurt má gerast, skal stovnurin ikki verða niðurfiskaður, sigur



Hjalti í Jákupsstovu.

Hann er samdur við Alta Hansen, formanni í Felagnum Nótaskip, sum í Útvarpi Føroya fríggjakvøldið segði, at norska útspælið er taktikkur. Men hann heldur fram, at so øðiliga nógvur taktikkur er í málinum.

– Hetta málið er vorðið alt ov politiskt til at verða loyst á fiskivinnupolitiskum stigi. Alt ov nógv av vinnuni, situr aftanfyri tá samráðingar eru, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Neyðugt er at loysa málið á allar hægsta politiska stigi. Tí málið skal loysast, skulu føroyingar ikki fáa ein stóran fíggjarligan smeit.